VIÐMERKINGAR

# Onki svar fingið enn

Símun á Høvdanum



Sjálvandi væntaði eg ikki svar frá Klaksvíkar Kommunu, tí tað fáa bara nøkur fá útvald. Takki fyri siðiliga kjakið í Norðlýsinum og sigur tað mær, at tað ruggar ikki alt rætt innan Býráðsins gátt.

Vit vóru teir fyrstu á økinum við Borðoyavík, tá var tað langt uttan fyri býin. Seinni eru so sethús komin, og fyri nøkrum árum síðani bleiv grannin hjá okkum eitt ídnaðarøki. Kann onkur fortelja mær, hvat er eitt ídnaðarøki? Og hvørjar treytir fylgja við, tá ið ein keypir eitt grundstykki frá Kommununi á einum ídnaðarøki? Teir sum nú hava keypt stykkið ímillum Spinnaríið og vegin á Borðoyavík, vita teir av, at stykkið hjá teimum møguliga er ov lítið til at byggja á? Ella ætlar býráðið enn einaferð at snúgva seg undan tí spurninginum.

Eg kann upplýsa, at býráðið hevur brúkt 10 tals milliónir upp á at gera ídnaðarøkið byggiklárt, og teir hava aftaná brúkt fleiri milliónir til at fríðka um økið, fyri at gera tað so gott fyri nýggju eigarunum at virka har uppi. Men teir fyrstu, sum komu á økið og bygdu á økinum, hava teir ikki brúkt eitt oyra uppá, uttan ein garð ímillum Spinnaríið og Bilverkstaðið hjá John Heinesen, har Timburhandilin betalti tilfarið og Kommunan gjørdi arbeiðið. Nú veit eg ikki, um teir nýggju eigararnir hava fingið somu treytir, sum vit fingu, men tað er kappingaravlagandi, at teir sum vit skuldu kappast við, fáa alt gjørt fyri borgarans penging, og vit sum vóru á økinum fyrst, illa nokk fáa ein veg til økið. Setti býráðnum nakrar spurningar tann 20. september í ár, nei heldur ikki har havi eg fingið nakað svar. Spurningarnir vóru hesir:

Hví Steinbjørn Jacobsen nú hevur selt stykkið til annan keypara:

1. Sagt varð, at vit skuldu fundast aftur, tá ið býráðið var til reiðar við tekning og tilboði. Nær verður tann fundurin?
2. Hví hevur Timburhandilin ikki fingið bjóðað stykkið niðan fyri matr. 881 til keyps, tá býráðið veit, at vit hava tekning liggjandi inni í býráðnum.
3. Veit næstan heilt víst, at Klaksvíkar Timburhandil hevur fingið lovað forkeypsrætt til stykkið niðan fyri Sprinnaríið fyri dagsprísin tá.
4. Hevur Klaksvíkar Kommuna ongan áhuga í, at Klaksvíkar Timburhandil eisini kann menna seg á økinum við Borðoyavík.
5. Hví hava vit onga innkoyring til høllina við Borðoyavík.
6. Eru okkara pengar ikki líka nógv verdir, sum pengarnir hjá hinum keyparunum.

Ein annar spurningur kann man nú seta. Hví bleiv hetta stykkið ikki lýst til sølu?

Vit hava fingið innlit í málið og taka vit árini frá 2001 til dags dato, so síggja tit gongdina niðanfyri.

Haldi sjálvur, at vit hava verið sera illa behandlaðir av Kommununi, og tað hevur havt stóran leiklut í, at vit hava selt Klaksvíkar Timburhandilin til aðrar at reka. Í longdini tímir ein ikki at virka, har tað skínir so væl ígjøgnum, hvønn Kommunan arbeiðir fyri. Hygg eisini eftir stykkinum á Stongunum. Alt gjørt fyri grannan fyri sunnan og hjá Klaksvíkar Timburhandli einki gjørt, men tað verður gjørt, tá ið ein trailari fer oman av, tá vakna teir. Har er ongin forðing fyri, og er tað ein deyðsfella, tá ið tveir stórir bilar møtast í hálku á Stangavegnum, har ein lyktapeli stendur næstan mitt á vegnum, og ein av bilunum má víkja. Bilurin hevur ongan annan møguleika, enn at renna seg omanav, mitt í eitt parkeringspláss ella ein handil. Hugsið um tað, áðrenn tað verður ov seint, men nú havi eg enn einaferð ávarað tykkum.

### Hvat við stykkinum í vestaru síðu

Fyri nøkrum árum síðani varð nógv skrivað um økið við vesturu síðu, har Eystlaks helt til, at tað var eitt fiskiøki, og tað bara var loyvi at virka fisk á økinum. Tey flestu av bløðunum í Føroyum skrivaðu greinar upp og niður um málið, har ein borgari hevði hug at gera eitt bilverkstað í Dávavirkinum. Stórt rumbul stóð av hesum, men seinni, hevur KBI havt handil á økinum í fleiri ár, og nú er eitt lastbilaverkstað á økinum. Er byggisamtyktin á økinum broytt?

Havi eisini hoyrt, at fleiri sum høvdu hug at byggja oman fyri Skipafelagið hava fingið noktandi svar, fyri at byggja á økinum, tí tað skuldi brúkast til rundkoyring og parkeringspláss. Havi eisini sæð brævi frá einum umsøkjara, har Steinbjørn Jacobsen hevur skrivað undir og givið umsøkjaranum noktandi svar. Hvussu kann tað bera til, at nú kann byggjast á sama stykki, og er tað stykkið lýst til sølu?

# Tað »Gert« ikki við

Hjalmar. N.Poulsen



Kann ikki annað enn koma við eini viðmerking um organiseraða óskilið á Landssjúkrahúsinum og avvarðandi umsiting.

Eitt er at sjúkrahúsumsitingin við beráddum huga ósakliga ætlar at avhøvda leiðandi yvirlækna á landssjúkrahúsinum. Hetta tí at viðkomandi yvirlækni vil sjúkrahúsverkinum tað besta, at fáa sum mest burturúr oyramerktu upphæddini. Hóast alt er tørvur á læknum við slíkum hugsjónum. Og serliga eisini tá talan er um lækna við serkunnleika á økinum.

Annað er, at øll løgtingssamgongan er drigin upp á tráð so tað forslær. Gud hjálpi mær, hoppa teir allir samlir, við báum beinum, upp á ósakliga pástand sjúktahússtjórans. Avsettar eru soleiðis kr 800.000 á føroysku landsfíggjarlógini til tveir serfrøðingar, so at sjúkrahússtjórin kann fáa ábendingar um, hvat er rætt og hvat er skeivt út frá einum leiðslusjónarmiði. Hetta er onki minni enn ein vælgrundað »falitterklering«. Hevði tá ikki verið betur, at sjúkrahússtjórin ruddaði skriviborið og stakk í sekkin?

Og at hugsa sær - jú sætt er tað. Hin 81-ára gamla var áhalsin, datt, og kom til skaða. Sjúkrabilurin kom á náttartíð eftir henni. Hon var flutt í børu á Landssjúkrahúsið. Aftan á at hava verið í røntkuni var staðfest, at ryggur hennara var brotin. Viku seinni bleiv hon heimafturblakað vegna sparingar á Landssjúkrahúsinum. Sjúkrabilurin kom hesaferð aftur við henni, eisini á børu, har hon lá í stálkorsetti um allan kroppin, tí pláss ikki var fyri henni aðrastaðni.

Men hvat? Hetta er Føroyar anno 2005.

# Vit lúka treytirnar og vilja taka ábyrgd

**– Føroysku politisku umboðini uppfylla krøvini til at verða viðurkendir á jøvnum føti, og vit taka fulla ábyrgd fyri norðurlendska samstarvinum, segði Kári P. Højgaard, norðurlandaráðslimur m. a. undir aðalorðaskiftinum á norðurlandaráðsfundinum, sum var í Reykjavík í síðstu viku**



Kári P. Højgaard

Den 18. marts 2003 blev beslutningsforslaget om, at Færøerne skulle søge om fuldt medlemskab, enstemmigt vedtaget i Lagtinget, og den 2. maj blev den formelle ansøgning sendt. På mødet i Karlstad i september blev et medlemsforslag til realitetsbehandling af den færøske ansøgning om fuldgyldigt medlemskab, som jeg var en del af, drøftet i præsidiet. Stemningen var positiv, og det blev bestemt, at sagen skulle fremlægges for ministrene på oktobersessionen i Reykjavîk. Vores forventning er, at præsidiet på decembermødet nedsætter en komite til at arbejde med at klarlægge de problemstillinger, der måtte være i behandlingen af Færøernes ansøgning.

Folkeretten er ikke en statisk størrelse, som kan fastlåses i gamle juridiske begreber, men er under stadig ændring. Vi kan i Nordisk Råd være med til at forme folkeretten med det færøske medlemskab og dermed være et forbillede for andre regioner i verden, hvor lignende associerede folk og lande ønsker medlemskab af regionale sammenslutninger. Et sådant medlemskab vil være med til at skabe fred og samarbejde og dæmme op for undertrykkelse og forhastet opløsning af sammensatte stater.

Ligeledes er det forkert, hvis dansk statsret bruges som begrundelse for at nægte os medlemskab. Vi har som land og folk altid været associerede til og ikke integrerede i Danmarks rige og har på den måde altid forbeholdt os selvbestemmelsesretten, som vi nu bruger til at søge om medlemskab af Nordisk Råd. Desuden lægger den danske grundlov vægt på, at det er kongen, som handler i udenrigspolitisk henseende, og den danske konge har jo som bekendt uden problemer i århundreder handlet som både dansk og norsk konge, samt konge eller hertug i en række lande - samtidig. Dansk statsret har derfor ingen historiske problemer med, at de til Danmark associerede lande fører en selvstændig uden-rigspol-itik.

Denne historisk korrekte og politisk nødvendige fleksibilitet er især relevant, når vi tænker på, at i disse dage anerkendes kurdere for første gang som en ligeværdig del af den irakiske føderation. De vil selvfølgelig se til Norden for at finde inspiration til fredelig udøvelse af deres selvbestemmelse i regional sammenhæng uden at sprænge de føderative rammer. Der må vi kunne pege på, at i Norden anerkender vi, at associerede lande og folk kan opnå fuld ligestilling i regionernes internationale samarbejde.

De færøske politiske repræsentanter opfylder alle krav til at blive anerkendt på lige fod og tager deres fulde ansvar for det nordiske samarbejdes udvikling.

Til slut vil jeg takke den afgående præsident i Nordisk Råd for et positivt arbejde i præsidiet og også de gode og spændende tanker, som den kommende præsident har givet udtryk for - tak.